## DAGSINS MEINING

# Leiðslukreppa

Orrustan í Tjóðveldisflokkinum hevur elvt til undran og spekulatión í politiska umhvørvinum. Sum kunnugt hevur formaður floksins, Høgni Hoydal, verið fyri hvøssum álopum frá fráfarna næstformanni floksins, Torbjørn Jacobsen. Orðadrátturin millum næstformann og formann hevur verið harður. Stríðið er nú komið so langt út, at Høgni Hoydal tykist at vera farin at umhugsa rættarmál móti flokksins enfant terrible, Torbjørn Jacobsen. Torbjørn, ið altið hevur havt mót og manshjarta til at ganga sínar egnu leiðir uttan mun til parolur og flokksboð frá formanninum, er týðuliga púra óávirkaður av hesi hóttan.

Skal verða gingið eftir innihaldinum í ósemjuni, snýr hon seg um, hvørt formaðurin hevur sagt ósatt um familjurættarligu lógirnar, ið vóru til viðgerðar í undanfarnu samgongu. Her stendur orð ímóti orði. Hóast formaðurin hevur fingið hjálp frá sínum gamla aðalstjóra í Tinganesi, tykist tað, sum ikki alt er komið fram í hesum máli. Tað er í sjálvum sær ivasamt, at ein av landsins hægstu embætismonnum leggur seg út í eitt innanhýsis flokksstríð. Hetta so mikið meira sum, at Torbjørn Jacobsen heldur fast um sín pástand, hóast aðalstjórin í innlendismálaráðnum (fyrr løgmálaráðnum) er komin tí kroysta flokksformanninum til hjálpar. Tað er tí nógv, sum bendir á, at Torbjørn hevur grein í sínum máli, og tað er pínligt fyri aðalstjóra so væl sum fyri formann Tjóðveldisflokksins.

Tað eru mong, sum spyrja, um hetta stríðið nú bara snýr seg um, hvør, ið hevur rætt í spurninginum um framløguna av familjurættarmálunum. Nógv bendir á, at hetta stríðið snýr seg um annað og meira. Spurningurin er, um ikki stríðið er eitt tekin um eina álvarsama og djúpa leiðslukreppu í Tjóðveldisflokkinum. Tað er einki at taka seg aftur í, at Høgni Hoydal hevur verið ein gløggur, íðin, dugnaligur og dynamiskur flokksleiðari. Hann hevur fastatøkur á flokkinum og hevur við harðari hond útmanererað alla andstøðu innnanflokks (ta gomlu garduna við Signari, Finnboga og teirra stuðlum á odda). Men so brast millum Torbjørn og formannin. Tað tykist samstundis rættiliga greitt, at alt fleiri tjóðveldisfólk hava ilt við at góðtaka leiðslustíl Høgna. Tjóðveldisflokkurin er ein rættiliga afturlatin flokkur, og tí hevur almenningurin uttan fyri umhvørvið kring formannin lítið innlit í tað, sum fer fram í flokkinum.

Uttan á nakran hátt at illtonkja formann og hansara næsta leiðsluumhvørvi, kundi ymisk bent á, at her er eitt demokratiskt undirskot í Tjóðveldisflokkinum. Hetta kann kanska við ávísum rætti sigast um allar føroyskar flokkar. Tað eru sum oftast formenninir, sum ráða fyri borgum innanflokka. Her er sostatt talan um ein generellan føroyska trupulleika. Hinvegin tykist trupulleikin í løtuni at vera størri enn vanligt er. Øðrvísi kann orðadrátturin millum Torbjørn og Høgna valla tulkast. Henda ósemja snýr seg ivaleyst meira um formansins dagliga atburð og stíl sum heild enn um eitt ávist politiskt trætumál. Formaðurin hevur ein trupulleika, og tá formaðurin hevur ein trupulleika, so hevur flokkurin ein trupulleika. Hetta má koma flokkinum illa við, tí heili tvey val standa fyri durum. Tískil man formaðurin ivaleyst vera til reiðar at fara langt til tess at bøta um viðurskiftini við Torbjørn Jacobsen og aðrar misnøgdar flokkslimir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lurtið eftir Johan í Kollafirði!

### Skilagóðir javnaðarmenn eiga virðing uppiborna, klára teir at steðga privatkommunismuni

**Sjúrður Skaale**



Tað ber ikki til bara at verja tað, sum vit hava. Vit mugu finna uppá okkurt nýtt. Og tá vit hava funnið uppá okkurt nýtt, skulu vit aftur finna uppá okkurt nýtt.

Hesin hugurður er grundarlagið undir vinnupolitikkinum í øllum framkomnum londum. Og tað er orsøkin til, at tey eru framkomin. Í tíðum har arbeiðspláss flyta og alt kann verða gjørt nógv bíligari í eysturlondum, er alneyðugt at finna nýggjar vinnuvegir.

Tí nýta øll framkomin lond veldugar upphæddir til vinnugransking: Hvussu gera vit tað betri, sum vit longu gera, hvussu finna vit uppá nýtt, og hvussu marknaðarføra vit.

Granskingin kastar einki av sær fyrstu tíðina - men hon gerst so við og við grundarlag undir einum stórum parti av búskapinum.

Lond, sum satsa upp á gransking, fáa altíð ein framlítandi, offensivan og sterkan búskap.

**Tann defensivi búskapurin**

Í Føroyum hava persónligir slóbrótarar givið landsbúskapinum nýggj bein at standa á. John Dam, Eiler Jacobsen og eitt ótal av øðrum, bæði stórum og smáum, hava verið framlítandi og offensivir.

Men okkara politikarar hava verið afturlítandi og defensivir. Í staðin fyri at stuðla teimum, sum kunnu finna okkum nýggj bein at standa á, hava teir verið paniskt ræddir fyri, at tey beinini, vit longu hava, skulu brotna.

Í 1980'unum kostaði henda ræðsla okkum kanska einar 10 milliardir tilsamans. Hugsanin var, at alt tað, sum var, skuldi verða verandi. Eisini tað, sum ikki bar seg. Konkurslógin varð sett úr gildi, tí politikarar dugdu ikki at ímynda sær, at menn, hvørs skip fór á heysin, nakrantíð kundu finna uppá nakað annað at gera.

Privatmenn fingu nógvar pengar, og Palleba fekk eina stóra rokning. Finnbogi Ísakson nevndi hetta mangan illgrunasama almenna-privata samstarv "privatkommunisma". Hon hevði til endans við sær at alt skramblaði saman, og fólkið fekk ein mylnustein av skuld um hálsin.

**Vísdómsorð úr Kollafirði**

Undir síðsta valstríði komu nógv vísdómsorð úr Kollafirði. Johan segði m.a. nakað soleiðis um vinnupolitikk: "Um ein maður dettur á vegnum, so trúgva vit sjálvsagt uppá, at hann er førur fyri at reisa seg upp og ganga víðari. Hann verður ikki liggjandi til hann doyr."

Trupulleikin er, at politikararnir ikki hava havt somu trúgv, tá tað snýr seg um eitt skip, sum fer av knóranum. Tá hevur hugsanin verið, at tey, sum missa arbeiði, ongantíð kunnu fara at gera nakað annað. Og tí mugu vit hjálpa teimum at gera tað sama, sum tey altíð hava gjørt - hóast tað gevur undirskot.

Men eitt sterkt vinnulív fáa vit bara um vit eggja fólki at finna uppá nýggj ting og ganga nýggjar leiðir. Tí er so týdningarmikið, at pengar verða brúktir til gransking. Um pengar í staðin verða brúktir til at stuðla undirskotsforrætningum, fáa vit hinvegin eitt veikt og sjúkt vinnulív. Tað kenna føroyingar alt til.

**Javnaðarfloksins avgerð**

Sitandi samgonga hevur gjørt tann stóra skaða, at hon hevur steðgað at kalla allari gransking í Føroyum. Tað er í sjálvum sær ein vanlukka.

Og nú vilja Fólka- og Sambandsflokkurin (teir rópa seg liberalar...) fara eitt stig víðari, og leggja privatar slangur niður í landskassan av nýggjum. Javnaðarflokkurin hevur ivast, og tað sigst hava verið stór ósemja innanflokka.

Men nú sær út til, at tann parturin av Javnaðarflokkinum, sum vil venda aftur til privatkommunismuna, hevur vunnið: Flokkurin er eftir øllum at døma gingin við til, at ávísar fyritøkur, sum geva undirskot, skulu stuðlast.

Javnaðarflokkurin má gera sær greitt, at hetta fær avleiðingar. Tað ber ikki til at gera mun á fólki og fyritøkum. Fáa rækjuskipini studning, verða nógvar 100 fyritøkur í Føroyum, sum fara at hava moralskan rætt til sama studning - ikki minst fiskavirki á landi. Trýstið frá hesum fyritøkum fer at økjast - og so er vandi fyri, at búskapurin aftur fer í knas.

**Hin møguleikin**

Men enn er einki samtykt. Hóast tað verður trupult, kann tann framlítandi parturin av Javnaðarflokkinum framvegis vinna stríðið. Ger hann tað, verður latið upp fyri fleiri møguleikum.

Størsti møguleikin er, at politikarar fara at broyta hugburð. Í staðin fyri at stuðla tí, sum ikki gongur, kunnu teir t.d. brúka pengarnar til vinnugransking í breiðastu merking. Tað er soleiðis tað almenna best stuðlar vinnuni, og tað er soleiðis, pengarnar kasta mest av sær til samfelagið. Ikki her og nú, men um nøkur ár.

Í stríðnum um skattalættan sær nú eisini út til, at tann framlítandi parturin av Javnaðarflokkinum hevur tapt stríðið móti teimum ábyrgdarleysu populistunum.

Men heldur ikki hetta er samtykt. Klára teir skilagóðu javnaðarmenninir eisini at steðga skattalættanum, kunnu eisini nakrir av teimum pengunum fara til framlítandi og offensivan vinnupolitikk. Eydnast tað, hava vit gott í væntu. Og so eiga hesir javnaðarmenn virðing uppiborna.

Boygna teir framlítandi javnaðarmenninir hinvegin undir trýstinum frá egnum flokki og tí stóra meirilutanum í ABC-samgonguni, sum eftir øllum at døma bara starir blint inn í fortíðina, kann tað hava við sær óbótaligan skaða fyri Føroyar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Frítíðarskúlin

*Nú frítíðarskúlin verður viðgjørdur í fjølmiðlunum er umráðandi at fólk vita okkurt um frítíðarskúlar, hví tørvur er á frítíðarskúlum og hvat flestu frítíðarskúlar arbeiða eftir.*

**Jógvan Philbrow**
*Frítíðarskúlaleiðari*

*Navnið "Frítíðarskúli" er heldur misvísandi, tí frítíðarskúlin er ikki í familju við ein skúla. Rætta heitið er frítíðarheim sambært Dagstovnalógina.*

**Hví ganga í frítíðarheim/ansing?**

Flest, hava helst tað áskoðanina at frítíðarheimi er bert til fyri at nøkta ein ansingar tørv hjá foreldrum, eitt stað har barnið kann verða meðan mamma og babba eru til arbeiðis. Tað er tað eisini, men tað eru eisini fleiri aðrar orsøkir til at barnið skal ganga í frítíðarskúla.

Ein øðrvísi bygdarmynd er eitt. Har ið húsini í bygdini stóðu mest sum í einum grannalagið, var lætt at finna sínar spælivinir. Nútíðin er øðrvísi, fjarstøða og ferðsla ger sítt til at tað er trupult, enntá vandamikið at skula leita sær spælivinirnar fram.

Samstundis sum bygdarmyndin er broytt, eru krøvini til nútíðar barni broytt. Eitt tað fremsta kravið til barni, nú, er samskiftis førleikin. Og hesin førleikin er torførur at menna og styrkja í einsemi.

Heimurin broytist, allur sum hann er, førdur fram á einari tíðaraldu, ið er ógjørlig at steðgað.

**Tíðaraldan**

Henda tíðaralda, førir broytingar við sær, skúlin, sum fyri stuttum var savningarstað klárar illa at metta økta tørvin frá samfelagnum. Bundin til, í ávísan mun, heldur stirvnum traditónum. Samstundis sum fleiri og fleiri ábyrgdir verða lagdar út til hann.

Nútíðin setur sera stór krøv til samskiftið - har møguleikarnar eru alsamt vaksandi.

Samstundis gerst ein av grundarsteinunum undir samskiftinum, nevniliga menniskja samveru, ella sosial samvera meira týðandi at duga.

Samskiftið krevur at tú skilir, mál, kropsmál, tónalag - og ymiskar samskiftishættir,umframt annað. Við øðrum orðum; tað krevst at verða sosialur.

Betur barni er fyri sosialt, betur er tað ført fyri at fóta sær í einum støðugt broytiligum samfelagið.

**Hvat er eitt frítíðarheim?**

Frítíðarheimi er fyrst og fremst eitt stað har ið barnið hevur frí. Tað at hava frí er, tað tíðina tú hevur at røkja tíni egnu áhugað mál.

Frítíðarheimi er staði har í barni hevur møguleikan at spæla við vinunum, floksfelagar og onnur, sínar javnlíkar, undir tryggum og helst eisini avbjóðandi korum. Tí frítíðarheimi skuldi helst eisini bjóða børnunum nøkur øðrvísi tilboð.

Á frítíðarskúlanum liggur høðusuppgávan í sosialiseringina av børnum, hendan hendur í stóran mun, í frítíðini hjá børnunum. Her er tað at tey sleppa at royna seg, kjakast um hendingar, evni sum hava verið uppi í skúlanum og aðrastaðni.

Her sleppa tey at gera sínar egnu royndir, undir tryggum umstøðum, har ið tey vaksnu eisini hava tíð og møguleikan at fylgja við og lofta, um tað skuldi verði neyðugt. Ein uppgáva sum gerast alsamt torførari í einum skemaløgdum degi - har pensum skal náast.

Karmarnir á frítíðarskúlanum eru leysir og tó. Fastar karmar fyri hvørjar avtalur eru galdandi, matpakka siðir og sømuligur atburður eru har fyri at tryggja at ein tryggleiki kann ráða í Frítíðar-skúlanum.

Tryggleikin aftur gerð at børnini fáa dirvi til at víðkað sjónarringin og granska umheimin.

Her er sosialisering sett í hásætið, móti fakligu innlæringin í skúlanum.

**Tað pedagogiska innihaldið í einum Frítíðarheimið.**

Fysisku karmarnir, sum frítíðarheim runt um í landinum, virka undir, eru enn ymiskir. Tó tori eg at við vissu at siga at flestu frítíðarheimini, við pedagogiskum leiðslum líkjast innihaldsliga. Dagligdagurin inniheldur ymisk tilboð, kreativt og rørsluligt, meðan denturin verður lagdur á at børnini hava frí. Tað at hava frí eigur at geva børnum rúm at spæla, sum teimum lystir, hava møguleikan at hvíla seg og at takast við onkrum sum hevur teirra áhugað.

Her eru ikki treytir settar fyri at børnini skulu læra okkurt ávíst, ella náa okkurt ávíst pensum. Her er tað barni, sum sjálvt sleppur at brúka tað tíðina tað vil, at læra, spæla og handla á lívspallinum.

# Ikki bara grenja, Jógvan

**Heðin Mortensen**
*formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar kommunu*



Í staðin fyri at vísa á tað positiva, sum er hent innan barnaansingarøkið, heldur Jógvan Arge fram við síni negativu skriving, líkt eini grátikonu.

Hann og hansara fólk kunnu ikki góðtaka, at sitandi samgonga í býráðnum hevur megnað at bygt ansingarstovnar og soleiðis loyst allan tørvin.

Hetta er hent bæði við og uttan hjálp frá Jógvan Arge, tí veruleikin er tann, at hann hevur atkvøtt ímóti ávísum ansingarstovnum, sum eru bygdir.

Jógvan Arge vísir eisini við síni skriving á, at hann eftir fýra ár í býráðnum framvegis ikki kennir vanligar mannagongdir innan býráðsarbeiði.

Tað stendur rimmarfast, og tað kunnu allir nevnarlimir í mentamálanevndini og umsitingini vátta, at Jógvan Arge hevur fingið øll tøl og ætlanir um regulering á barnaansingarøkinum fyrilagt á fundi í mentamálanevndini í sambandi við fíggjarætlanina.

Men framvegis leggur hann umsitingina og meg undir at siga ósatt. Tí fær niðurstøða mín ikki verið onnur, enn at Jógvan Arge hevur ikki bara sovið í tímanum — hann hevur snorksovið.

# Postverkið, ljóta dunnan

**Kári P. Højgaard**
*Løgtingsmaður*



Alfred Olsen løgtingslimur, hevur áhugaverda grein í bløðunum viðvíkjandi Postverkinum. Hetta býtisbarn hevur verið kastibløka í trimum samgonguskeiðum og hevði undirritaði fyri munni, tá løgmansrøðan var til viðgerðar, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevði góðar nervar, fyrst í samgonguskeiðnum at taka posthúsmálið til viðgerðar enn einaferð, tí hvørja ferð málið hevur verið frammi, hevur samgonguskeiðið fingið ein bráan enda.

Havi sjálvur verið virkin partur innan stovnin størsta partin av lívinum og er hægsta ynski mítt, at Postverkið klárar avbjóðingarnar, ið liggja fyri framman. Her verður neyðugt, at stig verða tikin, ið kosta pening og krevja politiskan rygg. Somuleiðis kann staðfestast, sum formaður Postfelagsins eisini hevur ført fram, at nøkur starvsfólk væntandi verða søgd úr starvi.

Aftur til greinina hjá Alfred Olsen, løgtingsmanni, ið samanber Postverkið við ævintýrið hjá H. C. Andersen, Den grimme ælling.

Fyrst er at siga, at søgan um Postverkið ikki á nakran hátt er eitt ævintýr, men at hetta er ein órongiligur veruleiki, sum vit mugu og skulu taka støðu til. Alfred Olsen skrivar sitat:

*Søgan um Postverk Føroya er tann øvugta, tí tá Postverkið í 1976 varð yvirtikið, var tað at líkna við ein svana..........*

Tað er rætt, at frímerkjadeildin hevur verið og er peningamaskinan í Postverkinum og tá samlaraáhugin minkar, ávirkar hetta eisini inntøkurnar.

Hvussu sá Postverkið út tá tað var yvirtikið og var tað nú tann vakri danski svanin, ið føroyingar yvirtóku, sum dugnaliga starvsfólkið smb. greinini hevur vanskepla til eina dunnu ?

Við yvirtøkuna átti Postverkið bert posthúsini í Havn og Klaksvík. Starvsfólkini, ið vóru limir í Dansk Postforbund, høvdu skipaði viðurskifti, men størsti parturin vóru sett "smb. kontrakt" (undirlønt mín viðmerking) har tey, ið høvdu posthúsið, fingu eina samsýning fyri leigu, reingerð og løn. Tað hevur kostað Postfelagnum almikið stríð og tikið nógv ár at fáa skipaði viðurskifti, so starvsfólkini innan henda stovn hava javnbjóðis setanartreytir við onnur almenn starvsfólk.

Hendan uppdatering av starvsfólkaviðurskiftum hevur kostað pening. Sama er galdandi fyri hølisviðurskiftini, har tað nú er ein frøði at koma inn á tey nossligu posthúsini, har fryntlig starvsfólk (skjótt øll í búna) avgreiða brúkaran skjótt og væl.

Bláu bilarnir, vakrir og reinir, bjóða bestu flutningstænastu. Tó, her andar kappingarráðið stovnin í nakkan, tí hesin við almennum stuðli kappast við privata marknaðin og tað er bert ein spurningur um tíð, hvussu leingi hetta gongur.

**Posthús í handlum**

Her eri eg grundleggjandi ósamdur.

Hendan skipan var galdandi, tá føroyingar sigldu við seglum og fram til 1970 árini, og er eftir mínum tykki eins avoldað. Trygdin við einari postskipan eigur ikki at verða løgd út til kioskir og handlar. Tey stig tikin verða, mega vera framstig og ikki sum Alfred mælir til 35 ára afturstig.

**7 posthús í Føroyum**

Hvussu nógv posthús eiga at verða, er fyrst og fremst ein spurningur, sum postverksleiðslan saman við landstýrismanninum ið umsitur málsøki, eigur at greiða politiska myndugleikanum frá, so hesir kunnu taka undir við broytingunum.

Tað skapar ótryggleika fyri starvsfólkini, at nærum líka so vist sum at fráboðanin um fjallgongu kemur í heystfrítíðini, kemur árliga fráboðanin frá postverkstjóranum um, at nú skal áseyðatalið minkast og uppsagnirnar koma. Gongan seinasta ár var rikin til spekingar og var nærum komin í rætt, tá fjallfólki av ósemju rímdi. Trupult er at skifta so nógv fjallfólk, og illa gongst hjá Bjarna at fáa seyðin í rætt, tí nú er eisini vargur komin í fylgi. Bergur og Bjarni royna at taka uttanrætta, men eins og teir ferføttu á fjalli goyggja og ikki altíð akta harra sín og gera eftir boðunum, eru tekin um, at av hesum ávum sleppa minst tríggir hesa ferð. Livst so spyrst.

Sjálvstýrisflokkurin vil vera við til at finna eina virðiliga loysn fyri Postverkið og taka neyðug stig, at tryggja at stovnurin verður uppdateraður til avbjóðingarnar, ið liggja fyri framman. Her skal nógvur peningur til ca. 35 mill. og var hetta eisini ætlanin saman við einskiljingini.

Spyrjið brúkaran, har landpostboð avloystu smærru posthúsini, hvussu skipanin er, og um tey kundu hugsa sær at vent aftur til tað gamla.

Alfred Olsen, ongin kann liva við hesi óvissuni og tað áliggur postverksleiðsluni og samgonguni at viðgera hetta málið innanhýsis saman við Postfelagnum, áðrenn farið verður í fjølmiðlarnar. Tað var undir alt lágmark, at postverksleiðslan enn einaferð fór út í fjølmiðlarnar í ótíð, uttan at starvsfólkini vórðu kunnaði, men tað er líka so langt úti, at tingmenn í samgongu alment viðgera støk mál av einari heild, áðrenn málið er viðgjørt endaliga innanhýsis og borðbart.